# Róðrarsambandið fer út at ferðast

**Næstu vikurnar fer Róðrarsamband Føroya at halda økisfundir kring landið, har tað fer at verða litið aftur á farna árið og fram móti nýggja kappingarárinum**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



Rógvararnir eru so smátt farnir at fyrireika seg til nýggja kappingarárið, og nú fer Róðrarsamband Føroya, RSF, at ferðast kring landið fyri at hitta tey, sum hava við kappróður at gera.

Endamálið er at kunna feløg og rógvarar um eitt nú fyrireikingarnar til stevnurnar, nevndararbeiðið í RSF og eisini um, hvussu tað skal fast fram undir sjálvum róðrinum.

Saman við RSF vera umboð fyri start- og høvuðsdómarar, umboð fyri stevnufyrireikarar og eisini rógvarar.

Í skrivi frá RSF verður sagt, at fundarluttakarar fara at hava møguleika at spyrja og at seta fram møgulig uppskot um, hvussu RSF kann betra um umstøðurnar í kappróðrinum.

Fyrsti økisfundurin verður í Vágs skúla leygardagin 4. februar klokkan 13.30. Tey í RSF heita á feløgini um at boða nevndarlimum og rógvarum at vera við á fundunum.

Tað er longu langt síðani, at tað varð avrátt, nær og hvar FM kappingarnar í róðri fara at vera. Fyrsti róðurin verður á Norðoyastevnu í Klaksvík leygardagin 27. mai ella eftir at tað er vorðið koyrandi um ella rættari undir Leirvíksfirði. Onnur kappingin verður tvær vikur seinni. Sundalagsstevnan verður í Kollafirði leygardagin 10. juni. Eystanstevnuróðurin verður á Skálafjørðinum 17. juni.

Í teimum trimum kappingunum, sum eru nevndar omanfyri, fer at verða kappast á øllum trimum teinunum (burtursæð frá í Klaksvík har tað ikki ber til at rógva 2000 metrar. Í fýra teimum seinastu FM kappingunum í summar fer tað bara at vera kappast á túsund metrum. Tað fer tað at verða á Jóansøku í Vági 24. juni ella sjálvan jóansøkudag. Tað fer tað eisini at verða á Fjarðastevnu í Vestmanna leygardagin 8. juli, á Vestanstevnu í Sandavági 15. juli og á Ólavsøku, har tað fer at verða róð ólavsøkuaftan, sum verður fríggjadagin 28. juli.

# Fowler aftur á gamlar gøtur

Ein tann best umtókti áleyparin, Liverpool nakrantíð hevur hvat, er Robbie Fowler. Vátt kom tó í reiðrið, tá hann varð trokaður av ovastu rók av Emile Heskey og Micheal Owen, og tí fór hann í 2001 til Leeds. Síðani endaði hann í Manchester City, har avrikini hava verið misjøvn.

Liverpool hevur nú fingið fatur á Fowler fyri einki, av tí at sáttmáli hansara við Manchester City rennur út í summar. Avtalan millum partarnar er bert galdandi komandi hálva árið, tá støðan aftur verður tikin til viðgerðar.

Tað hevur ikki ligið væl fyri hjá áleyparunum í Liverpool at skora mál, og hetta er ein roynd at styrkja álopið við einum manni, sum kann skora mál. Spurningurin er bert, um Fowler framvegis hevur tað máltev, ið hann hevði fyri nøkrum árum síðani.

30 ára gamli Fowler hevur skotið ikki færri enn 170 mál fyri Liverpool, tey níggju árini hann umboðaði felagið.

-SíS

# SÍ slapp ongan veg

**Mjølnir vann tryggan sigur um vikuskiftið, og er talan tí framvegis um knallharðan dyst um silvurið í bestu mansdeildini**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eydnaðist ikki SÍ at vinna seg avgerandi framum Mjølnir, tá tey bæði næst fremstu liðini í meistaradeildini hjá monnum hittust um vikuskiftið.

SÍ hevur tað mesta av árinum verið á øðrum plássi. Og vunnu teir eisini dystin í Klaksvík, kundu teir skræða seg avgerandi leysan í so máta.

Men tað eydnaðist ikki. Mjølnir vann nevnliga 3-0 á SÍ, sum bara í fyrsta settinum veruliga gav ábendingar um, at teir eisini ætlaðu sær okkurt úr dystinum. Tað setti fór heimaliðið tó avstað við at enda, og so høvdu teir takið. Tey bæði seinastu settini hevði Mjølnir ikki teir stóru trupulleikarnar, og soleiðis eru teir nú bara tvey stig aftan fyri SÍ á stigatalvuni.

# TB fer eftir silvurinum

**SÍ snávaði ikki hesaferð, men kortini kenna tær nú av álvara trýstið frá TB, sum veruliga tykist vera komið fyri seg**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er neyvan nakar ivi um, at tað verður Dráttur, sum í ár sleppur at rópa seg føroyameistara í kvinnuflogbólti. Munurin frá Drátti og niður til hini liðini er longu nú somikið stórur, at tað nærum er óhugsandi, at leiðslan skal tveitast fyri borð.

Men tað merkir tó ikki, at talan er um keðiliga kapping. Dysturin um næstu sessirnar er knallharður, og eftir dystirnar um vikuskiftið stendur greitt, at tað fyrst og fremst eru TB og SÍ, sum skulu stríðast um hetta.

## TB vardi borg

TB hevði í Trongisvági vitjan at ÍF, sum undan dystinum var á fjórða plássinum. ÍF hevur glepsað hart eftir hinum liðunum fleiri ferðir, men skuldu tær gera álvara av hóttanunum, so var mest sum tvingandi neyðugt við einum sigri á TB.

Talan gjørdist eisini um eina sera tætta uppgerð, har ÍF av álvara beit frá sær, men stigini fingu tær kortini ikki við sær. Tey bæði fyrstu settini vann TB við minst møguligum muni. Og tó at ÍF megnaði at svara aftur, so fall TB ikki í fátt.

Í hinum dystinum um vikuskiftið vann SÍ tryggan sigur í Klaksvík. SÍ snávaði annars í miðvikuni, tá tær taptu fyri KÍF, men hesa ferð tóktust tær uppsettar uppá, at sama mistak ikki varð gjørt enn einaferð. Tankarnir fóru tó kanska at reika nakað, tá Mjølnir tók fyrsta settið, men eftir hetta vóru tað kortini tær á vitjandi liðnum, sum høvdu munin.

**Úrslitini um vikuskiftið**
**Meistaradeild kvinnur**

| | |
|---|---|
| TB-ÍF | 3-1 (26-24, 25-23, 19-25, 25-20) |
| Mjølnir-SÍ | 1-3 (25-20, 17-25, 23-25, 20-25) |

**Meistaradeild menn**

| | |
|---|---|
| Mjølnir-SÍ | 3-0 (31-29, 25-21, 25-18) |

**ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN**
**MENN**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 H71 | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 376 | 318 | 58 | 14 |
| 2 VÍF | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 382 | 367 | 15 | 13 |
| 3 Kyndil | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 367 | 333 | 34 | 11 |
| 4 StÍF | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 345 | 345 | 0 | 10 |
| 5 KÍF | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 353 | 374 | -21 | 6 |
| 6 Neistin | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 360 | 446 | -86 | 1 |

**Flogbóltsstøður**

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Dráttur | 13 | 13 | - | 0 | 39 | 12 | 27 | 16 |
| 2 SÍ | 14 | 9 | - | 5 | 32 | 25 | 7 | 11 |
| 3 TB | 14 | 7 | - | 7 | 28 | 23 | 5 | 10 |
| 4 ÍF | 13 | 6 | - | 7 | 27 | 26 | 1 | 6 |
| 5 Mjølnir | 13 | 3 | - | 10 | 16 | 33 | -17 | 4 |
| 6 KÍF | 13 | 2 | - | 11 | 12 | 35 | -23 | 3 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fleyr | 11 | 10 | - | 1 | 31 | 11 | 20 | 13 |
| 2 SÍ | 10 | 7 | - | 3 | 24 | 13 | 11 | 8 |
| 3 Mjølnir | 10 | 5 | - | 5 | 21 | 16 | 5 | 6 |
| 4 ÍF | 9 | 3 | - | 6 | 14 | 20 | -6 | 3 |
| 5 Nøvan | 10 | 0 | - | 10 | 0 | 30 | -30 | 0 |

# Dýrt keypt meistaraheiti

Enska meistaraliðið hevði eitt undirskot uppá hálvaaðru milliard krónur. Eygleiðarar høvdu væntað eitt undirskot á eina milliard, men tað gjørdist also 1,5 milliardir, tá avtornaði. Síðsta ár hevði Chelsea eitt undirskot á eina slaka milliard, so undirskotið er økt munandi. Hóast størsta undirskotið, sum nakað Premier League felag hevur havt, stúrir leiðslan í Chelsea als ikki fyri støðu felagins.

Stjórin í Chelsea, Peter Kenyon, sigur, at hesin roknskapurin er ein partur av eini langtíðaræltlan, sum byrjaði í 2003. Hann sigur, at metstóra undirskotið kemst av nøkrum óvanligum útreiðslum, ið eru neyðugar fyri at náa málinum um at hava javnvág á roknskapinum í 2010.

Og so leingi Abramovic heldur við Chelsea, er væl ikki tann stóri vandin fyri, at felagið skal fara heilt av króranum…

-SíS